






# Snotilig hús í vøkrum umhvørvi í miðbýnum í Havn

Stásiligu arkitektteknaðu húsini eru í serflokki til útsjónd, møguleikar og dygd, og hvussu væl tey standa fyri.

**Fyrsta fatanin**
Longu tá tú nærkast húsunum, fært tú eina góða kenslu í búkin. Hetta er nakað heilt serligt. Tu fært tað ikki at bera til, at eini so nýggj hús standa so væl fyri so nær miðbýnum. Arkitekturin er tignarligur og presentabul, men eisini eitt sindur fremmandakendur.

**Stílur og snið**
Sjálvt um húsini standa í býarumhvørvi er opið, frítt og frískligt, og her kanst tú anda frítt bæði inni og úti. Tú kennir teg ikki innilæstan, tí her er albogarúm og møguleikar at virka og liva. Stílurin er ungur, ljósur og opin, men eisini stásiligur, hugnaligur og fjálgur.

**Inni og úti**
Í hugnaliga alrúminum / stovuni er brenniovnur, ið er bygdur inn, so hann eisini kann brúkast sum peis. Lætt er at koma út og inn. Tú kanst ganga beinleiðis út á svalan / terassuna og njóta útsýnið, hugnaliga umhvørvið og hvønn sólargeisla úr erva.

**Kjallarin**
Í kjallaranum er alt klárt innrætta og góðir møguleikar at gera liðugt. Har eru alskyns møguleikar fyri, at tú kanst seta tín dám á liviumstøðurnar og skapa tær júst teir bústaðarkarmarnar, ið tú vilt hava.

**Garagan**
Kemur tú til húsini, kanst tú fjarstýra sjálvvirkandi portrinum og koyra bilin heilt inn í húsini og ganga beinleiðis longur inn. Har er eisini góður hjallur og vaskirúm.

**Urtagarðurin**
Uttan er alt gjørt liðugt og sera snotiligt. Urtagarðurin hevur reinar linjur og er stílfullur, og møguleikarnir fyri at fara víðari við at velta, planta og sáa eru sera góðir. Allir karmarnir eru longu skaptir, so tú kanst fara víðari.

**Umhvørvið**
Húsini standa í miðbýarøki í vøkrum, veðurgóðum og friðarligum umhvørvi við blindan veg og hava góðan sólargang og gott útsýni. Heilt stutt er til viðarlund, skúla, dagstovn, bussamband, miðbý og handilsøki.

**Fakta**
Húsini – Varðabú 8, Tórshavn – eru í 2 hæddum – hvør á 155 fermetrar – í alt 310 fermetrar. Grundøkið er 518 fermetrar. Byggiár: 1997. Í erva er inngongd, durur, gongd, baðirúm, hjúnarrúm, 2 kømur, bryggers við egnari inngongd og niðurgongd til niðaru hædd, køkur / alrúm / borðsstova, stova, hugna- og sjónvarpsstova við brenniovni / peis og útgongd til svala. Í neðra eru 2 inngongdir, hjallur, vaskirúm, garaga við sjálvvirkandi hurð og stórt kjallararúm, ið er klárt at innrætta til bústað. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst. Meira fæst at vita hjá Inni – tel. 354200 ella á heimasíðuni www.inni.fo

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 320 410 • Fax 320 510
inni